## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, í kvøld veksur hann vindin til hvassan vind av vestri. Ælingur, partvís kavi og hitin fellur niður til frostmarkið.




**Veðrið mikudagin:**
Fyrrapartin upp í hvassan vind av útsynningi og okkurt kavaælið, men um kvøldið veksur hann vindin til skrið av suðri og regn. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Skrið ella stormur av útsynningi, seinnapartin minni vindur av vestri. Ælingur, partvís kavi og hitin millum frostmarkið og 3 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av suðri og útsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

Óli Hansen, nevndarformaður í trimum fyritøkum:

# Stjørnan hjá Framtaksgrunninum

**Framtaksgrunnurin hevur valt at skipa virksemi hjá sær soleiðis, at sami maður er formaður fyri tríggjar av teimum stóru fyritøkunum, sum grunnurin eigur í. Nýggi formaðurin í nevndunum er Óli Hansen, sum skal vera við til at mynda fleiri av størstu fyritøkunum í landinum**

VINNULÍV
*Heri á Rógvi*

Fyrrverandi stjórin fyri formula.fo, Óli Hansen, er eftir stuttari tíð komin í eina rættiliga serstøðu innan føroyskt vinnulív. Hann er bæði vorðin formaður fyri nevndina hjá Fiskasøluni, Fiskavirking og nú seinast eisini formaður fyri nevndina hjá Kalli.

Orsøkin til hetta er, at Framtaksgrunnurin hevur valt at broyta leistin hjá sær, soleiðis at tað í dag sigur ein og sami formaður fyri nevndina í nøkrum av fyritøkunum, ið grunnurin eigur í. Framtaksgrunnurin eigur einsamallur Fiskasøluna og Fiskavirking og eigur størsta partin í Kalli.

Eftir hvat skilst, so ætlar Framtaksgrunnurin á henda hátt at skipa arbeiðið hjá sær betri og syrgja fyri, at fyritøkurnar hjá grunninum ikki ætlar gera sama arbeiði og harvið fara at kappast móti hvørjum øðrum.

Tað verður Óli Hansen, sum fer at manna formansstarvi í hesum higartil trimum fyritøkunum. Framtaksgrunnurin hevur heitt á hann um at taka sær av hesum uppgávunum. Sjálvur hevur Óli Hansen ikki so nógv at viðmerkja til, at hann nú er komin í hesa lyklastøðuna.

– Hetta er enn somikið nýtt, at tað ikki er so nógv at siga um hetta, uttan tað, ið Framtaksgrunnurin longu hevur sagt alment, sigur Óli Hansen, tá ið Sosialurin hitti hann á eykaaðalfundinum hjá Kalli leygardagin.

Óli Hansen er klaksvíkingur. Hann hevur útbúgving sum løgfrøðingur, og hann hevur áður starvast sum stjóri fyri formula.fo. Formansstarvini hjá honum vera tó ikki eitt fulltíðarstarv hjá honum. Hann hevur nevniliga eisini saman við einum øðrum keypt Vestmanna Timburhandil. Tað verður, í øllum førum í fyrstu atløgu, her, at Óli fer at hava sína dagligu gongd. Umframt at hann sjálvandi eisini má seta eitt sindur av tíð av til nevndararbeiði.



*Óli Hansen er settur sum formaður fyri Føroya Fiskavirking, Kall og Fiskasøluna*
*Mynd: Heri á Rógvi*

Uppsetan av antennum og parabolum




Søla og tænasta
Verkstaður
Antennu- og parabolmontering
Útleigan
radioep@olivant.fo
RADIOHANDILIN
. insensg ta 1 O 100 rsha n
l . 18277 a 18 77

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷10 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | 3 |
| Halifax | 8 |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | ÷1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 13 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | ÷1 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 14 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 23 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | – |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 30 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 968 hPa. vestan fyri Ísland fer móti Íslandi og dýpist enn meira.




Djúpa lágtrýstið yvir Íslandi fer spakuliga eystureftir og dregur kalda luft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/11 kl. 06⁰⁰– 26/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,7°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 25/11 kl. 06⁰⁰– 26/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 132,0 mm

BILLUTIR



ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

### VESTFALLSKYRRINDI

22. nov.: Fyrra kvarter
23. nov.: Mánin longst frá jørðini
30. nov.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. nov | 03.44 | 16.04 | 02.44 | 15.04 | 02.59 | 15.19 | 05.44 | 18.04 | 06.44 | 19.04 | 01.59 | 14.19 | 00.59 | 13.19 | 03.59 | 16.19 | 04.59 | 17.19 | 03.29 | 15.49 | 04.44 | 17.04 |
| 28. nov | 04.24 | 16.44 | 03.24 | 15.44 | 03.39 | 15.59 | 06.24 | 18.44 | 07.24 | 19.44 | 02.39 | 14.59 | 01.39 | 13.59 | 04.39 | 16.59 | 05.39 | 17.59 | 04.09 | 16.29 | 05.24 | 17.44 |
| 29. nov | 05.04 | 17.26 | 04.04 | 16.26 | 04.19 | 16.41 | 07.04 | 19.26 | 08.04 | 20.26 | 03.19 | 15.41 | 02.19 | 14.41 | 05.19 | 17.41 | 06.19 | 18.41 | 04.49 | 17.11 | 06.04 | 18.26 |
| 30. nov | 05.48 | 18.09 | 04.48 | 17.09 | 05.03 | 17.24 | 07.48 | 20.09 | 08.48 | 21.09 | 04.03 | 16.24 | 03.03 | 15.24 | 06.03 | 18.24 | 07.03 | 19.24 | 05.33 | 17.54 | 06.48 | 19.09 |

5 707265 100029 >